


# Lærugreinaráðgevi

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2005.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um **skúlabyrjan, serundirvísing, støddfrøði, alis- og evnafrøði og náttúra/tøkni.**

Samanlagt eru 18 lønartímar um vikuna at søkja. Ein lønartími er umleið 1,6 *fyrisitingartímar.* Vanliga hevur lærugreinaráðgevi 6-12 lønartímar um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiigan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein og starvsøki, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta kt í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og løntir í lønarflokki 30.3. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

**Starvslýsing**
Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt:

- Ráðgevin skal í øllum lutum virka fyri einari námsligari menning í skúlanum
- Ráðgevin skal støðugt halda seg kunnugan við ta menning, sum er á námsliga, fakliga og tøkniliga økinum
- Ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðsháttum í einstøku lærugreinunum

Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum og í toymum.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. mei 2005.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Petur Simonsen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

LMS Landsmiðstøðin

*__Landsmiðstøðin__ er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3927**
**Navn:** P/F Postverk Føroya
**Adressa:** Óðinshædd 2 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 29-12-2004
**Viðtøkudato:** 29-12-2004
**Hjánøvn:** P/F Føroya Postur (P/F Postverk Føroya), P/F Post Faroe (P/F Postverk Føroya), P/F Postur (P/F Postverk Føroya), P/F Posturin (P/F Postverk Føroya)
Stovnarar:
Vinnumálaráðið , Tinganes, 100 Tórshavn
**Nevnd:**
Jan Danielsen, á Gadd, 655 Nes, Eysturoy, (nevndarformaður)
Ben Arabo, 416 Signabøur, (nevndarlimur)
Brynhild Setberg, Orknoyarvegur 12, 100 Tórshavn, (nevndarlimur)
Stjórn:
Bergur í Garði, Haraldstrøð 8A, 100 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:**
P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 21.500.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 21.500.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóra saman við nevndarformanni ella næstformanni ella av nevndarformanninum saman við tveimum øðrum nevndarlimum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka postvirksermi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.
Grundarlagið undir stovana felagsins er løgtingslóg nr. 90 frá 20. desember 2004 um at stovna partafelag at reka postvirksemi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 29.12.2004 - 31.12.2005

Skráseting Føroya
tann 07. apríl 2005

Kristin Balle

## Fyrilestur um málsliga menning av brekaðum børnum eftir Karlstadmetoduni

Hóskvøldið tann 14. apríl skipar foreldrabólkurin hjá børnum við Down Syndromi fyri spennandi fyrilestri um málsliga menning hjá brekaðum børnum – við serligum atliti til fólkaskúlan. Fyrilestrahaldarar vera Barbro Svensson, serlærari úr Svøríki, og Johanna Andreassen, mamma at barni við Down Syndromi úr Føroyum.

Fyrilestrarnir eru serliga ætlaðir lærarum, læraralesandi, foreldrum og øðrum, sum arbeiða við børnum, ið á einhvønn hátt eru málsliga tarnaði, men øll áhugað eru hjartaliga vælkomin.

**Fyrilestrarnir verða í auluni á Læraraskúlanum hóskvøldið tann 14. apríl kl. 19.00.**

Vegna fyrireikarnar
**Foreldrabólkurin hjá børnum við Down Syndromi**

**GSM telefonir &**

**GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar**

Storno SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo




FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026

Lesið Sosialin